*Arbeitt hjá Statoil í nakrar mánaðir:*

# Lorvíkingur til London at tulka seismik

*Føroyski jarðfrøðingurin Petur Norðgerð úr Lorvík hevur góðar tríggjar mánaðir tulkað seismikk úr føroysku undirgrundini hjá Statoil í Danmark. Herfyri legði hann fyrstu úrslitini fram fyri føroysku oljufyrisitingina á fundi í Havn*

Hóast bert fáir føroyingar enn hava beinleiðis tilknýti til oljuvinnuna í okkara grannalondum, so gongur tað tó tann vegin, at fleiri serstakliga ungir føroyingar - fáa sær arbeiði í oljuvinnuni

Ein teirra er 32 ára gamli lorvíkingurin Petur Norðgerð Oljusamtakið The Atlantic Margin Group gjørdi fyrr í ár av at seta ein føroyska jarðfrøðing í arbeiði í eitt ár fyribils Hetta varð gjørt í sambandi við, at fyrstu upptøkurnar hjá Western vórðu klárar til at tulka

Síðani 13 februar hevur Petur Norðgerð arbeitt saman við øðrum jarðfrøðingum á rannsóknarstovuni hjá Statoil í Danmark Har hevur hann tikist við ymiskt fyrifallandi eitt nú at tulka seismikk frá Lolitafeltinum í Norðsjónum Seinastu tíðina hevur hann tulka seismikk frá føroyska økinum

-Hetta er sera spennandi arbeiði, hóast onkur kann halda tað er nakað jarðbundið, sigur ein heldur skemtandi Petur Norðgerð við Tíðindablaðið Sosialin

Hann heldur tað vera rættiliga áhugavert at vera við í arbeiðinum, nú tað vónandi ber til at fáa tær fyrstu ábendingarnar, um umstøður eru í føroysku undirgrundini at goyma olju

**Petur greiddi oljuráðleggingarnevnd frá**

Tá Statoil, Mobil og Enterprise fyri viku síðani hovdu fund við oljuráðleggingarnevndina í Havn greiddi m a Petur Norgerð frá tulkingini av føroyska seismikkinum

Hetta greiddi hann væl úr hondum hava vit frætt Ætlanin er at Petur Norðgerð í næstum skal fara til London at arbeiða hjá Enterprise og Mobil Har skal hann eisini tulka seismikk umframt annað arbeiði

**OBS kanningar**

Í næstu viku er so ætlanin at hann skal fara við norska rannsóknarskipinum Håkon Mosby, sum í løtuni gera OBS kanningar, sokallaðar havbotnsseismiskar kanningar við Føroyar fyri tey trý oljufeløgini

Har skal hann kunna seg við hetta serliga slagið av seismikki

Tey trý oljufeløgini hava sett av nógvar pening til júst hesar kanningar, sum kunnu sigast at vera eitt náturligt framhald av teimum seismisku kanningunum, sum Western hevur gjørt

Við hesum kanningum fer tú niður á havbotnin og tekur ímóti signalunum, sum verða skotin og harvið fær tú nógv neyvari upplýsingar um løgini undir basaltinum

Petur Norðgerð sigur, at oljusamtakið vónar at fáa eina meira greiða mynd av løgunum við hesum kanningunum og harvið kunna finna fram til, um hon er har, í hvørjum løgum tað er mest sannlíkt, at oljan finst

-Vit vóna at hava eitt úrslit av hesum kanningum seinni í ár sigur Petur Norðgerð, sum heldur, at Atlantic Margin Group er ein sera væl samansettur bólkur Hvørt felag kann við sínum royndum vera við til at fáa eina neyva og greiða mynd av føroysku undirgrundini og møguleikanum at finna olju

jan





*Tveir av jarðfrøðingunum, sum Petur Norðgerð hevur og skal arbeiða saman við vm. Lew Murdock, kanningarstjóri hjá Mobil Oil og Vidar Larsen, kanningarstjóri hjá Statoil í Danmark Mynd kalmar*




**Samkoman Sion Vágur**

Sunnudag kl 11 00 Morgunmøti

Sunnukvøld kl 18 00 Evangeliskur fundur

Mánakvøld kl 20 00 Bønarfundur

Hóskvøld kl 20 30 *Bønarfundur hjá Erling Bech í Porkeri* Øll kunnu vera við

Bønartænastan svarar á tlf 73172, frá kl 20 30-22 30

## Prógv

Urd Johannesen, Glyvrum, hevur á Ålborg Universiteti lokið prógv sum cand mag í enskum og altjóða viðurskiftum

Ringið!
- og vit skriva
11820

## VALUTAKURSIR

| | | 29.05.95 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| USA | Dollari | 542,60 | 537,95 |
| Bretland | Pund | 867,05 | 870,56 |
| Týskland | Markur | 390,93 | 392,81 |
| Svøriki | Króna | 74,77 | 74,49 |
| Noreg | Króna | 87,79 | 87,21 |
| Frakland | Frankur | 110,94 | 111,19 |
| Belgia | Frankur | 19,03 | 19,086 |
| Sveits | Frankur | 473,81 | 475,43 |
| Holland | Gyllin | 349,24 | 350,64 |
| Italia | Liri | 0,3307 | 0,3177 |
| Finnland | Markur | 127,39 | 127,34 |
| Ísland | Króna | 9,59 | 8,57 |
| Eysturríki | Skillingur | 55,645 | 55,827 |
| Spania | Pesetas | 4,507 | 4,394 |
| Portugal | Escudos | 3,721 | 3,711 |
| Kanada | Dollari | 396,80 | 394,62 |
| Japan | Yen | 6,5368 | 6,4580 |
| Írland | Pund | 888,94 | 883,48 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,438 | 2,408 |
| | XEU | 720,71 | 720,80 |

Kelda: **Føroya Sparikassi**

## 2562

Vit eru nú 2562, íð hava undirskrivað Fólkaátakið fyri tjóðfundi

Vit í nevndini skulu takka øllum

Enn er ikki ov seint at koma við, tí freistin gongur ikki út fyrr enn fríggjadagin tann 9 juni Vit bjóða øllum teimum vælkomnum, sum hava hug til at vera við í hesum verki

**Nevndin í Fólkaátakinum fyri tjóðfundi**